# Sissal í vanda

**Hóskvøldið var Sissal ein av teimum, sum stóð á gáttini til at verða atkvødd út úr Big Brother húsinum**

BIG BROTHER
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Framtíðin hjá føroysku Sissal, sum er við í donsku reality-sendirøðini Big Brother hjá TV Danmark 2, er nú óviss. Hóskvøldið var hon ein av teimum trimum íbúgvunum, sum fólk kundu senda út úr húsinum. Úrslitið eydnaðist okkum tó ikki at fáa áðrenn blaðið fór til prentingar, av tí at atkvøðugreiðslan ikki endaði fyrr enn seint hóskvøldið.

Men hvussu er ella ikki, so er Sissal ein av teimum íbúgvunum, mest tos hevur verið um í húsinum. Saman við dananum Robert hevur Sissal verið eitt tað heitasta kjakevnið hjá donskum fjølmiðlum, tí hjá parinum varð lagt upp til meira enn bert eitt óskyldugt fríggj. Nógv varð tosað og skrivað um tey bæði fyri nøkrum vikum síðani, og tá alt kom til alt, fingu donsku sjónvarpshyggjararnir eisini tað teir so leingi høvdu bíðað eftir. Fyri fyrstu ferð í donsku Big Brother søguni varð eitt par kynsligt saman inni í Big Brother húsinum, og hesum borðreiddi ongin minni enn Sissal og Robert við.

## Í isolatión

Men tað er ikki bara við kynsligum sambandi, at Sissal fær gjørt um seg inni húsinum. Fyri nøkrum vikum síðani pakkaði hon kuffertið og var á veg út, men broytti í síðstu løtu meining. Mikudagin bjóðaði hon seg at fara í isolatión í 24 tímar fyri at íbúgvarnir skuldu klára vikuuppgávuna, sum Big Brother hevði sett teimum.

Sissal og Tania vóru tær, sum vóru mest fyri at verða settar í isolatióni 24 tímar.

– Tað er ein risastór avbjóðing, og um eg verði send út úr húsinum hósdagin, so er hendan uppgávan nakað, sum eg heldur enn fegin hevði viljað havt við mær út, segði Sissal verða orsøkina til, at hon bjóðaði seg fram.

Men tað gjørdist Tania, sum endaði í isolatión til beinleiðis sendingin hjá Big Brother byrjaði hóskvøldið.

Hvussu er ella ikki, so kundi føroyska Sissal hóskvøldið verða send út úr eygleidda húsinum. Úrslitið frætta vit meira um í morgin.



*Sissal Ólafsdóttir Frisdahl hevur verið ein av mest umrøddu luttakarunum í Big-Brother sendiraðini hjá TvDanmark í heyst*
*Mynd: Billednet.dk*




# Ljósviðgerð

Kennir tú teg troyttan?
Hevur tú brúk fyri meira svøvni?
Er tað ringt at koma upp um morgunin?
Ert tú illa upplagdur?
Ert tú erkvisin?
Manglar tú orku?
Hevur tú eina søta tonn?

**Kanska skuldi tú roynt lampuna til ljósviðgerð**

Serliga um heystið og um veturin ynskja vit meira ljós. Mangul uppá ljós gevur ofta eina kenslu av dapurleika, manglandi orku og mótloysi og kann eisini geva eina nógv økta trongd til søtt. Hetta verður ofta nevnt tunglyndi. 5-6% líða av tunglyndi og nógv fleiri eru vetrartroytt.

Gransking vísir at LJÓSVIÐGERÐ kann hjálpa teim flestu (70-75%) av við vetratroyttheit/tunglyndi.

Ljósviðgerð 1/2 til 1 tíma dagliga (best um morgunin) er í teim flestu førum nokk. Ímeðan tú fært ljósviðgerð kanst tú t.d. eta morgunmat og/ella lesa eitt blað.

Sum oftast merkist innan 14 dagar um ljósviðgerðin hjálpir. Les meira um tær lampur vit hava at selja og um gransking av ljósviðgerð á okkara heimasíðu www.ergo.fo undir LJÓSVIÐGERÐ.

Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 •Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

Sosialurin 341800


# Fyrilestur og pallborð

**Á Sandoyar Meginskúla fara tey komandi sunnudag at seta ljóskastaran á viðurskiftini hjá børnum og ungum**

UNG
*tíðindaskriv*

Seinastu mánaðirnar hevur ein áhugabólkur mannaður av 2 lærarum, 1 pedagogi og 2 heilsufrøðingum arbeitt við eini ætlan at seta ljóskastaran á viðurskifti hjá børnum og ungum í dagsins samfelagi.

Umstøður og viðurskifti eru broytt og broytast! Hvussu bera vit okkum at sum samfelag, skúli, stovnur, foreldur o.s.fr. at leiða nýggj ættarlið inn í ein rættiliga samansettan (kompleksan) heim?

Hugskotið at seta ljóskastaran á hesi viðurskifti er sprottið úr eygleiðingum av børnum og ungum seinastu árini. Ein eygleiðing, ið onkursvegna meiri og minni ørkymlar okkum! Eru børn og ung slept upp á fjall, ella duga tey vaksnu ikki at møta børnum og ungum, ið liva ein dag og ein heim, sum bjóðar rúgvuvís av tilboðum av alskyns slag døgni runt? Og hvør er tað sum skal uppala nýggj ættarlið? — foreldur, skúli, stovnur???

Fyrilestrarhaldararnir, ið eru Eyðun Joensen sálarfrøðingur, Sølvi Reinert Hansen ítróttaráðgevi hjá ÍSF, Marna Jakobsen lærari á Sandi og Jóngerð Poulsen heilsufrøðingur taka støði í teirra faki og arbeiði. Tey røða um, hvussu tey síggja viðurskiftini hjá børnum og ungum í okkara samfelagi 2003.

Byrjað verður sunnudagin kl. 14.30 við fyrilestrunum á skránn. Síðani verður pallborð har áhoyrararnir eru vælkomnir at spyrja.

Tiltakið er ætlað øllum áhugaðum. Øllum, sum onkursvegna eru um børn og ung.

Vegna fyrireikingarbólkin:
Eli Hentze
Kristian Johannesen
Poula úr Gørðum
Laila Petersen
Elsa Vest


Til Keypmannahavn ....... Prísir úr Dkr. 1.695,-
Til Billund ..................... Prísir úr Dkr. 1.733,-

Minst til títt Maersk Air Bonuskort

Vitja eisini okkara nýggja handil á www.maersk-air.fo
Maersk Air · Handilskjarnin · FO-100 Tórshavn · Tel.: 35 74 74 · Fax: 35 74 75
Prísirnir eru uttan avgreiðslugjald á Dkr. 220,-

MAERSK AIR
It's got to be perfect




# Støðan er dramatisk

**Útsendi føroyingurin í Irak, Tommy Petersen, sigur, at støðan er dramatisk í Basra í løtuni, eftir sjálvmorðsbumbuna í Nassirya mikudagin. Tað er ikki meir enn tveir tímar við bili millum Basra og Nassirya, og tískil taka íbúgvarnir í Basra sjálvmorðsatsóknina í størstum álvara.**

ÚTSENDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Útsendi føroyingurin í Basra, Tommy Petersen, sigur, at støðan er dramatisk í Basra, har hann arbeiðir. Ógvusliga sjálvmorðsatsóknin í grannabýnum, Nassirya, hevur skakað íbúgvarnar í Basra.*
*Mynd: Savnsmynd*

Hóast kríggið í Irak er fyri langari tíð síðan av, so gongur fáur dagur uttan vit hoyra í fjølmiðlunum um ymiskar atsóknir í landinum. Seinasta dømi er bumbuatsóknin ímóti italsku løgregludeildini í býnum Nassirya, ið liggur har suðuri í Irak. Talan var um eina sjálvmorðsatsókn. Ein heimagjørd bumba brast í lastini á einum bili, sum koyrdi á politistøðina í Nassirya. Atsóknin hevur higartil kravt 26 mannalív, og fleiri eru løstað. Tey flestu av teimum deyðu eru italiumenn. Italski forsetin, Carlo Azeglio Ciampi, er á gosi um hendingina, og fordømir álopið, ið hann kallar eina andstyggiliga yvirgangsatsókn.

Tað eru ikki bert fólk í Nassirya, ið eru óttafull um álopið á italiumenninar. Í býnum, Basra, har føroyingurin, Tommy Petersen, hjálpir til við at byggja fyrisitingina upp aftur, taka íbúgvarnir sjálvmorðsatsóknina í Nassirya í størsta álvara.

## Dramatiskt

Býirnir, Nassirya og Basra, liggja báðir suðuri í Irak, og tað tekur ikki meira 2 tímar at koyra við bili millum býirnar. Undir Irak-krígnum og eftir kríggið hevur harðast leikað á norðuri í Irak, men álopið í Nassirya hevur fingið fólk at umhugsa, um tað nú er so trygt og friðarligt har suðuri í Irak.

Tommy Petersen greiðir frá, at støðan er rættiliga dramatisk í Basra í løtuni, eftir atsóknirnar í Nassirya fyrrapartin mikudagin.

– Basra liggur bert 150 km frá Nassirya, og tískil hugsa fólk her í býnum nógv um atsóknina, sigur útsendi føroyingurin í Irak, Tommy Petersen.

Hann fortelur, at fólk í býnum hyggja álvarsamt at tilburðinum, tí vanliga er friðarligt í økinum, og hetta slagið av atsóknum hava tey ikki sæð áður. – Bil og sjálvmorðsbumbur hava vit ikki upplivað áður her suðuri. Vísir tað seg, at hetta slagið av atsóknum hevur flutt seg suður til okkara, so er støðan sjálvsagt rættiliga álvarsom, greiðir Tommy Petersen frá.

Hann kennir seg kortini ikki beinleiðis hóttan av atsóknina í Nassirya, tí irakisk herðlið leggja vanliga ikki eftir sivilum fólki, men halda seg til útlendsku herðnaðardeildirnar í landinum.

Sjálvmorðsatsóknin í Nassarya, ið higartil hevur kravt 26 mannalív, hevur broytt støðuna í Basra. – Eftir sjálvmorðsatsóknina í Nassirya eru trygdarkrøvini herd í býnum, sigur Tommy Petersen

## Gongur væl

Síðan ólavsøku í ár hevur Tommy Petersen verið Irak, har hansara uppgávan er at uppbyggja lokalu fyrisitingina í Basra. Eftir nógv ár við einum harðrendum einaræðisstýri undir Saddam Hussein, er uppgávan hjá Tommy og øðrum útlendingunum at hjálpa irakum við at byggja landið upp aftur.

Hjá flestum okkara man tað neyvan kennast serliga tespilligt at arbeiða í einum landi, har tað dagliga valdar so nógvur ófriður, men Tommy Petersen metti avbjóðingina vera so mikið spennandi, at hann valdi at fara av stað.

Hann hevur nú arbeitt í Basra í góðar fýra mánaðir, og arbeiðið gongur væl. – Arbeiðið við at byggja upp lokalu fyrisitingina í Basra gongur sum ætlað. Sjálvsagt er trygdin allatíð í hásæti. Vit hava eina rúgvu av trygdarfólki rundan um okkum, og vit hava ikki loyvið at ganga úti í býnum einsamøll, sigur Tommy Petersen .

Hann sigur seg hava tað gott, og arbeiðið gongur framá. Irakar eru óførir at samstarva, og hann kennir á sær, at irakar eisini eru glaðir fyri arbeiðið, sum verður gjørt í Basra.

## Jól við Nilánna

Tíðin hjá Tommy í Irak hevur so at siga bara verið nýtt til at arbeiða. Hann arbeiðir allar vikudagar, so tað er ikki nógv tíð til frítíð. Herfyri fekk hann kortini tíggju dagar burtur frá arbeiðinum. Familjan úr Føroyum varð bjóðað niður til Reyðahavið, har tað eisini varð høvið til ein túr til Egyptaland og pyramidurnar.

Á jólum fær hann aftur frí í nakrar dagar. Tá kemur familjan aftur á vitjan, og tá gongur leiðin til Nilánna, har tey fara at halda jól. Eftir jól, skal Tommy Petersen vera í Irak í góðar tveir mánaðir afturat, og so vendir hann nøsina heimaftur til Føroya. Við í skjáttuni hevur hann óivað eina rúgvu av spennandi upplivingum úr Irak.


kærleiki, Restorffs og tónleikur



**DÉJÀ VU spæla Fríggjakvøldið frá Kl 23.00.**
Vertshúskjallarin - staðið har ung forelskaði hittast, tónleikur veksur í hjørtunum meðan motoriska nervalagið stabiliserar seg við Restorffs.



**Leygarkvøldið Kl 21.00**
eru vit sera errnir yvir at kunna presentera
**MARTIN JOENSEN** og hansara tónleikarar. Martin Joensen, livandi legendan úr Vestmanna, maðurin aftanfyri Svarta Ravn, Morgun, 60 ini og allar hinar klassikararnar, live í Vertshúskjallaranum.



Og so fara vit at dansa frá **Kl 24.00 við KJØTBEIN AND HIS COOKED XMAS TROLLS.**
Kollbein, Sámal og Ronnie, garvaðir tónleikarir og Restorff fanatikarar.

Og so er bæði konsert og dansur ókeypis !
Drekkið Restorff so Restorffs fær fíggjarligan møgulleika at fáa Havnina at swinga……

Sjálvandi hava vit J-kvøld 21.45 - 22.45 (best umtókta J í Føroyum hesaferð)



YERTSHÙSIÐ
hjá Restorffs · tel 31 48 48
VIT SÍGGJA TRØLL Á ALLJÓSUM DEGI



Sosialurin 341800